


BILUR OG AVGJØLD ÍROKNAÐ

## BILPAKKI TIL NOREGS

Njótið frælsið, ið kemst av at ferðast í egnum bili. Farið til Noregs. Pakkið bilin í túninum, koyrið umborð, hugnið tykkum á ferðini og farið so frísk og væl hvíld í land. Tykkum nýtist heldur ikki at stúra fyri, at okkurt liggur eftir – hvørki á út- ella heimferð. Við Smyril Line fáa tit alt við.

### RING 34 59 00 OG HOYR NÆRRI

**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við WC/bað (uttan vindeyga) fyri 4 fólk og 1 persónbil. Øll avgjøld eru íroknað.

11.05 og 14.09 - 05.10
**Fyri hvønn úr bert 528,-**

17.05 - 19.06 og 14.08 - 07.09
**Fyri hvønn úr bert 799,-**

26.06 - 07.08
**fyri hvønn úr bert 995,-**



# Virðisbrævarøktari og greinari til fíggjardeildina

Virksemið í Sparikassasamtakinum er støðugt vaksandi. Ikki minst er vøksturin stórur á fløguøkinum og í tí sambandi hava vit tørv á fleiri starvsfólkum til at ráðgeva kundum okkara.

Føroya Sparikassi er ein nýmótans fyritøka við nógum árum á baki, við virksemi í Føroyum og Danmark. Vit stremba eftir at geva núverandi eins væl og nýggju kundum okkara køna og trygga ráðgeving, ið byggir á veruliga tørv kundans.

Fyri framhaldandi at kunna veita hesa tænastu, søkja vit eftir tveimum starvsfólkum til fløguøkið:

**Virðisbrævarøktari**
At ráðgeva kundum okkara, størri sum smærri, søkja vit eftir einum virðisbrævarøktara, sum er áhugað/ur í at veita kundum okkara skilagóða og fullfíggjaða ráðgeving, sum livir upp til visión okkara um at vera Føroya brúkaravinaligasti peningastovnur.

**Brennir tú fyri at:**

- samskifta við kundar?
- veita eina góða tænastu?
- at seta tær høg mál og røkka teimum?
- geva kundunum eina góða uppliving?
- arbeiða undir avbjóðandi umstøðum?
- flenna og hava tað stuttligt saman við starvsfeløgum?
- læra nýtt?
- fáa fakligar avbjóðingar?

Um so er, hava vit rætta starvið til tín. Faklig útbúgving á økinum er ein fyrimunur, men ikki eitt krav. Harumframt dugir tú sjálvandi at samskifta á føroyskum, donskum og enskum, og kanska eisini á øðrum málum.

**Greinari (analytikari)**
Aðalvirðini í Føroya Sparikassa eru brúkaravinsemi og tryggleiki. Vit vilja fegin vera kend fyri at veita eina fakliga og yrkiskenda ráðgeving, ið tekur støðu í veruliga tørvi kundans. Hetta merkir, at tað, vit lata av hondum, skal hava høga góðsku og virði fyri kundan.

Fyri at veita kundum okkara eina framúr góða ráðgeving, sóknast vit eftir einum greinara, ið skal stuðla okkara kundaráðgevum, so hesir kunnu veita kundunum bestu ráðgeving.

**Brennir tú fyri at:**

- deila vitan tína við onnur?
- veita eina sera góða tænastu?
- fáa fakligar og persónligar avbjóðingar?
- seta tær høg mál og røkka teimum?
- arbeiða við torskildum og avbjóðandi uppgávum?
- veita eina dygdarráðgeving?
- flenna og hava tað stuttligt saman við starvsfeløgum?
- læra nýtt?
- læra frá tær?

Ert tú útbúgvin búskaparfrøðingur ella hevur líknandi útbúgving, dugir at samskifta á føroyskum, donskum og enskum, og kanst svara ja til omanfyri nevndu spurningar, kunnu vit bjóða tær eitt krevjandi, avbjóðandi og spennandi starv. Lesandi, sum eru um at vera liðug við útbúgvingina, eru eisini vælkomin at søkja. Løn verður ásett eftir avtalu og arbeiðsstaðurin er Yviri við Strond.

Áhugaði kunnu hoyra meira um hesi størv við at venda sær til Finn Danberg, fíggjarleiðara, tlf. 348610, teldupost finn.danberg@sparikassin.fo ella Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsóknir skulu vera Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. mai 2006 og skulu sendast til:

**FØROYA SPARIKASSI**
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visiónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænatur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á fíggjardeildini starvast 10 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI

petur & petur • 320870